## Fakta

**Navn:** Brandur Enni
**Aldur:** 18 ár
**Bústaður:** Varberg uttanfyri Stockholm
**Familja:** Mamma, pápi, stórasystirin Bergljót og stóribeiggin Tróndur. Damu.
**Áhugamál:** Tónleikur og at lesa. Favoritturin beint nú er enski høvundin Nick Hornby. Brandur lesur seinastu bók hansara »Polysyllabic Spree«



# sleppa undan

– Vit vóru savnað til eina samrøðu fyri eitt blað her í gjár. Tey vildu, at vit skuldu standa sum á eini skúlamynd. Eg var "The exchange student", eftirsum eg eri úr Føroyum. Charlotte Perelli, sum vann Evropeiska Grand Prixið 1999, var "The Prom Queen". Tað var stuttligt, og tey vóru sera professjonell.

*Væntar tú at lívið hjá tær fer at broytast av hesi kappingini?*

– Eg veit ikki rættuliga, kanska fara fólk at kenna meg aftur á gøtuni á ein annan hátt enn nú. Men eg leggi ikki planir eftir hesum. Hetta er eitt tiltak, og eg kann ikki satsa alt uppá tað. Eg og nakrir vinmenn fara á konsertferð í summar. Vit hava skrivað nógv løg seinasta árið. Meginparturin er eitt sindur »retro« inspirerað við futti í. Tað verður stuttligt at koma út at spæla.

### Vil ikki hava Merkið at veitra

*Nær kemur næsta fløgan út?*

– Beint aftaná Grand Prix kemur ein stakfløga við lagnum "Lullaby" út, men fløgan, ið skal gevast út í Svøríki og Føroyum, kemur ikki út fyrrenn í heyst. Eg havi skrivað avtalu við plátufelagið Lion Heart International, og eg skrivi løg saman við fólki, sum áður hava samstarva við Celine Dion og Joe Cocker.

*Hvat livir tú so av í løtuni?*

– SU! Eg gangi á einari útbúgving fyri sangskrivarar her í Svøríki, og hetta er eitt slag av starvsvenjing eg eri í nú.

Brandur býr saman við trimum vinmonnum uttanfyri svenska høvuðsstaðin Stockholm. Tað er torført at fáa nakað at búgva í, so teir hava leigað eini hús saman.

Áður hevur Brandur búð í Norðursvøríki, har skúlin hjá honum liggur.

*Væntar tú at tað verða nógvir føroyingar til staðar í Gøteborg?*

– Sum eg veit um higartil, verða tað einir 20 føroyingar.

*Vil tú at tey skulu veittra við merkinum?*

– Nei, helst ikki. Eg luttaki sum føroyingur, men um fólk veittra við merkinum, vænti eg, tað kann ávirka sviar at velja ein av teirra "egnu" í staðin.

*Eru fólk áhugað í, at tú er føroyingur?*

– Ja, øll spyrja nógv um Føroyar.

*Og so síðsti spurningurin Brandur – er tú nervøsur?*

– Nei, higartil eri eg slettis ikki nervøsur. Eg verði kanska eitt sindur nervøsur, tá eg komi til Gøteborg, men mær dámar væl at standa á pallinum, so tað man ikki fara og bila.

Sum áður nevnt so verður kappingin leygarkvøldið 9 februar. Hon byrjar klokkan 20.00 føroyska tíð, og Kringvarp Føroya samsendur sendingina við Sveriges Television.

Tað ber tíanverri ikki til at stemma uppá Brand úr Føroyum.



*Brandur Enni hevur harða kapping í hálvfinaluni í svenska Grand Prixnum í kvøld. Kendir sangarar sum Amy Diamond, Christer Sjøgren og E-Type eru við í kappingini*